# Býráðið

**Dagfesting:** 19.06.2023 kl. 19:00
**Málnr.:** 22/00084

Nevndarlimir: Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, David Andreasen, Edva Jacobsen, Eivin Breiðaskarð, Gudny Vang, Magni Jøkladal, Ólavur Larsen

Varalimir: Bergtóra Cederiusdóttir fyri Sonna á Horni

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Jóanis Erik Køtlum

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 21/23 | 23/00246-6 | Inkalling av Bergtóru Cederiusdóttir, sum varalim fyri Sonna á Horni, til býráðsfundin 19. juni 2023 |
| 22/23 | 22/00501-18 | Byggiloyvi til 5 tangar |
| 23/23 | 23/00289-2 | Byggiloyvi |
| 24/23 | 23/00297-2 | Uppskot um adressubroytingar á Toftanesvegi |
| 25/23 | 23/00293-1 | Eykajáttan mai 2023 |
| 26/23 | 23/00325-1 | Eykajáttan til Heilsumiðstøð |
| **Til kunning** | | |
| | | |

1

**Til støðutakan**

## 21/23
## 23/00246-6 Inkalling av Bergtóru Cederiusdóttir, sum varalim fyri Sonna á Horni, til býráðsfundin 19. juni 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 19.06.2023 | 21/23 |

2

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Býráðnum | | |
|---|---|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Sonni á Horni, býráðslimur, hevur forfall til býráðsfundin 19. juni 2023 kl. 19:00. Eftir ynski frá Sonna á Horni skal varalimur kallast inn til býráðsfundin sambært § 18, stk. 1 í kommunustýrislógini.<br><br>Fjórðvalda á lista Á Lillian Jacosen hevur boðað frá at ikki ber til hjá henni at luttaka á býráðsfundi 19. juni 2023. Næst á lista Á er Bergtóra Cederiusdóttir.<br><br>Býráðið skal – samsvarandi § 18, stk. 3 í kommunustýrislógini – fyrst á fundinum 19. juni 2023 gera av, um treytirnar fyri innkallan av tiltaksliminum Bergtóru Cederiusdóttir eru loknar samsvarandi § 18, stk. 3 í kommunustýrislógini. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Sonni á Horni hevur forfall til býráðsfundin 19. juni 2023. | | |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt**<br>Kommunustýrislógin<br>• **Møgulig fylgiskjøl** | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Nei | Nei |
| | Umsitingarligar | Nei | Nei |
| Tilmæli | Borgarstjórin mælir til, at Bergtóra Cederiusdóttir tekur sæti í Fuglafjarðar býráð í sambandi við fundin 19. juni 2023. | | |
| Dagf | 19. juni 2023 | | |

**Býráðið 19. juni 2023:**
Býráðið tók einmælt undir við, at Bergtóra Cederiusdóttir tekur sæti fyri Sonna á Horni á býráðsfundinum 19. juni 2023.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**22/23**
**22/00501-18 Byggiloyvi til 5 tangar**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 06.06.2023 | 11/23 |
| 2 Býráðið | 19.06.2023 | 22/23 |

**Tilráðing**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Til viðgerðar í | Vinnu- & havnanevndini | | |
| Stutt lýsing av málinum | Byggiloyvi til 5 tangar | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Søkt verður um frávik frá reglunum í samband við frástøðu til grannamatrikul og veg miðju.<br>Umsóknin er viðgjørd í teknisku deild eftir BEK 1639 kap. 4 og send til viðmerkingar hjá arbeiðs- & brunaeftirlitinum. Arbeiðs- & brunaeftirliti meldaði aftur, at teir høvdu ongar viðmerkingar til málsviðgerina hjá Teknisku deild.<br>Frávik kann gevast við tað at eitt «overrislingsanlæg» á tangarnar verður gjørt. Byggiharri hevur gingið hesum kravið á móti í umsóknini um byggiloyvi til 5 tangar. | | |
| Grundarlag | • BK 17 og Bekendtgørelse om brandfarlige og brændbare væsker ( BEK nr 1639 af 06/12/2016 (Gældende))<br>• Umsókn og tekningar | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | | |
| | Umsitingarligar | | |
| Tilmæli | Tekniski leiðarin mælir til at taka undir við byggiloyvinum | | |
| Dagf | 25.05.2023 | | |

4

**Vinnu- og havnanevndin 06. juni 2023:**
Vinnu- og havnanevndin fylgir einmælt tilmælinum frá tekniska leiðara

**Býráðið 19. juni 2023:**
Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum frá teknisk leiðaranum.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**23/23**
**23/00289-2 Byggiloyvi**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 06.06.2023 | 12/23 |
| 2 Býráðið | 19.06.2023 | 23/23 |

**Tilráðing**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Til viðgerðar í | Vinnu- & havnanevndini | | |
| Stutt lýsing av málinum | Byggiloyvi av/til høll á matr. Nr. 871az og bp.<br>Tekniska deild hevur viðgjørt umsóknina og gjørt viðmerkingar til umsóknartilfarið. Tá ið hettar er rætta, kann byggiloyvi gevast. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Umsókn um byggiloyvi. | | |
| Grundarlag | • Byggisamtyktin og BK17<br>• Umsókn og tekningar | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur ið lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | | |
| | Umsitingarligar | | |
| Tilmæli | Tekniski leiðarin mælir til at geva byggiloyvi. | | |
| Dagf | | | |



**Vinnu- og havnanevndin 06. juni 2023:**
Vinnu- og havnanevndin hevur samskift við eigara av matr.nr. 871az og 871bp um at umsóknin hevur skeiv matr.nr sum søkt verður at byggja á. Umsøkjarin ynskir at málið verður viðgjørt um at byggja á matr.nr. 871az og 871bp og ikki á matr.nr. 871bn og 871bq, sum stendur í umsóknini.
Vinnu- og havnanevndin viðmerkir at onnur byggiloyvir á matrikklunum ikki verða galdandi tá ið hetta loyvið verður givið.
Vinnu- og havnanevndin fylgir einmælt tilmælinum frá tekniska leiðara.

**Býráðið 19. juni 2023:**
Býráðið tekur einmælt undir við tilmælinum frá tekniska leiðaranum um, at geva byggiloyvi.

7

## 24/23
## 23/00297-2 Uppskot um adressubroytingar á Toftanesvegi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 08.06.2023 | 34/23 |
| 2 Býráðið | 19.06.2023 | 24/23 |

### Tilráðing

| Til viðgerðar í | Tekniska nevnd/ býráð | | |
|---|---|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Í samband við at íbúðarbyggingin fer í gongd aftur, verður neyðugt at broyta adressunar úti á Toftanesvegi. Uppskot fyriliggur í sakini.<br>Umráðandi er at íbúgvar sum verða ávirkaðir av hesum, fáa boð um ætlaðu broytingarnar. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Bygging á Toftanesvegi | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>• Uppskot til adressubroytingar | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Nei | Nei |
| | Umsitingarligar | Nei | Nei |
| Tilmæli | Til støðutakan | | |
| Dagf | 25.05.2023 | | |



**Tekniska nevnd 08. juni 2023:**
Tekniska nevnd mælir einmælt býráðnum til at fylgja uppskotinum um adressubroytingar, sum er víst á kortskjali. Og at borgarar sum broytingin umfatar, verða kunnaðir áðrenn broytingin fer fram

**Býráðið 19. juni 2023:**
Býráðið samtykti einmælt at koyra málið aftur í nevnd fyri at koma við nýggjum uppskoti um at broyta numrering, soleiðis at verðandi hús fáa 1-tal frammanfyri.

## 25/23
## 23/00293-1 Eykajáttan mai 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.05.2023 | 24/23 |
| 2 Býráðið | 25.05.2023 | 19/23 |
| 3 Fíggjarnevndin | 16.06.2023 | 28/23 |
| 4 Býráðið | 19.06.2023 | 25/23 |



### Tilráðing

| Til viðgerðar í | Fíggjarnevndini og Býráðnum |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Leypandi roknskapareftirlitið, dagførdir prísir og óvæntað meirarbeiðið vísa longu nú í mai 2023 at tørvur er á eykajáttan og umraðfesting á avísum økjum.<br><br>Ynskini um eykajáttan mai 2023 eru hesar:<br><br><u>Øki 2: Almanna og heilsumál:</u><br>Rakstrarstað 264 Doktarahúsini hevur tørv á 125 tkr. tí arbeiði við brotnari kloakk og ótøttum oljutanga hevur gjørt viðlíkahaldsarbeiði dýrari en væntað.<br><br>Rakstrarstað 280 Serflutningsskipan hevur tørv á 100 tkr. fyri at halda núverandi skipan koyrandi.<br><br><u>Øki 5: Mentan og Frítíð:</u><br>Rakstrarstað 532 Kunning um kommununa hevur tørv á 300 tkr., til bókaútgávuna av bind I og II av Fuglafjarðar kommununi, sum miðað verður ímóti kemur út í heyst. Orsøkin til meirkostnaðin er serliga at generelli prísvøksturin hevur gjørt prentingina dýrari enn upprunaliga mett.<br><br><u>Øki 6: Teknisk mál:</u><br>Rakstrarstað 614 matr. nr.614 rakstur av FK bygningi hevur tørv á 100 tkr., til hølini har gartnaradeildin og húsavarðarnir halda til. Hetta var av misgáum ikki komið við í fíggjarætlanina upprunalig. Peningur til hetta endamál verður tikin frá Rakstrarstað 616 Arbeiðsbygningar og er hendan meirjáttan tí útreiðsluneutral. |

<table>
<tr><td></td><td colspan="3">Rakstrarstað 615 matr. nr. 437 (FK-íløgur). Her er ynski frá sosiali nevnd um at fáa bygningin málaðan í ár. Tekniska deild hevur fingið eitt tilboð uppá hetta til 170 tkr. Peningur er ikki settur av til hetta endamál í 2023.<br><br>Rakstrarstað 637 Kirkjugarðar(íløgur) hevur tørv á 250 tkr., tí lægsta tilboð uppá víðkanina av kirkjugarðinum aftaná samráðing, varð 250 tkr. hægri enn upprunaliga avsett.<br><br>Rakstrarstað 672 Reinhald og kavarudding hevur tørv á 400 tkr., tí lutfalsliga nógvi kavin fyrst í árinum hevur viðført meirnýtslu á hesum rakstrarstaðnum.<br><br><u>Øki 7: Kommunal virki:</u><br>Rakstrarstað 750 Fuglafjarðar havn hevur tørv á 250 tkr., sum er løn til fjórða havnaumsjónarmannin, sum lýst er eftir, tað í eftir er av árinum. Við nógva økta virkseminum á havnaøkinum er tørvur á einum havnaumsjónaðarmanni afturat fyri at fáa vaktarætlanina at hanga saman, at fáa feriu avviklaða, hava tøka orku í samband við sjúku og annað virksemi.</td></tr>
<tr><td>Orsøk til at málið verður viðgjørt</td><td colspan="3">Sambært kommunu stýrislógini §38 skal fíggjarnevndin ummæla uppskot til eykajáttan, sum skal leggjast fyri býráðið og sambært § 41 krevur eykajáttanin tvær góðkenningar frá kommunustýrinum við í minsta lagi 14 daga millumbilum.<br><br>Málið um eykajáttan hevur verið umrøtt hjá Teknisku nevnd, Vinnu og Havnanevndini, Sosialu nevnd, Mentamálanevndini og Orku- og Umhværvisnevndini í mai 2023. Nevndirnar hava gjøgnumgingið rakstrarstøðini tær vara av og eru komin við umbøn um umraðfestingar, sum fyrst fíggjarnevndin skal ummælta áðrenn býráðið viðger tær.</td></tr>
<tr><td>Grundarlag</td><td colspan="3"><ul><li>Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tilíkt<br>Kommunustýrislógin og Kommunustýrisskipanin fyri Fuglafjarðar kommunu</li><li>Møgulig fylgiskjøl<br>Eykajáttan várið 2023.doc<br>Tilbod - prent av Fuglafjardar søgu 2020 og 2023.pdf</li></ul></td></tr>
<tr><td colspan="4" align="center">Viðgerð</td></tr>
<tr><td rowspan="3">Tekstur íð lýsir loysn</td><td>Avleiðingar</td><td>Stuttíðar</td><td>Langtíðar</td></tr>
<tr><td>Fíggjarligar</td><td>ja</td><td>nei</td></tr>
<tr><td>Umsitingarligar</td><td>nei</td><td>nei</td></tr>
</table>

11

| | |
|---|---|
| Tilmæli | Eykajáttanarumbønin omanfyri er tilsamans 1.695 tkr. og funnar eru 100 tkr., sum kunnu umraðfestast at fíggja meirjáttanina. Mælt verður til at fíggjarnevndin viðger umbønina og mælir býraðnum til at hækka rakstrarkarmin við 1.595 tkr, alternativt, at gera umraðfestingar í mun til verandi fíggjarætlan.<br><br>**Tilmæli til fundin 15. juni 2023**<br>Eingin broyting er komin síðan 1. viðgerð og verður tí mælt fíggjarnevndini at tekur undir við eykajáttanini til 2. viðgerð og mæla býráðnum til at samtykkja eykajáttanina við 2. Viðgerð. |
| Dagf | 21. mai 2023<br>14. juni 2023 |

**Fíggjarnevndin 23. maj 2023:**
Fíggjarnevndin tekur undir við við eykajáttanini og mælir til at hækka rakstrarkarmin við 1.175 tkr. og løgukarmin við 420 tkr. Meirjáttanin verður fíggjað av innistandandi.

**Býráðið 25. maj 2023:**
Býráðið tók einmælt undir við eykajáttanini fyri mai 2023 og fer hon við hesum til aðru viðgerð.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2023:**
Fíggjarnevndin tekur undir við eykajáttanini og mælir býráðnum at samtykkja eykajáttanina við aðru viðgerð.

**Býráðið 19. juni 2023:**
Býráðið tók einmælt undir við eykajáttanini við aðru viðgerð.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

## 26/23
## 23/00325-1 Eykajáttan til Heilsumiðstøð

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 16.06.2023 | 29/23 |
| 2 Býráðið | 19.06.2023 | 26/23 |

## Tilráðing

| Til viðgerðar í | Fíggjarnevnd og býráðnum |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Umvælingin av fyrrverandi FK bygninginum til heilsumiðstøð (Rakstrarstað 615) er nú um at gerast liðug.<br>Ætlanin fyri 2023 var at fíggja bygging og innbúgv lutvíst av ikki- nýttari játtan í 2022 og lutvíst av nýggjari játtan í 2023.<br><br>Av tí at løguinntøkurnar sviku í 2022, var eingin játtan at framflyta til í 2023.<br><br>Talan er tí ikki um, at sjálv verkætlanin kostar meira enn væntað, men at tað netto ikki varð løgupeningur at flyta frá 2022 tí aðrar verkætlanir kostaðu meira og inntøkan av grundøkja sølu varð minnið enn væntað.<br><br>Tað restar upphædd til innbúgv í løgujáttanini fyri 2023. Tekniska deild hevur samráðst við veitara av innbúgvið um innkomna tilboðið og er eftir samráðing komin fram á kostnaðin:<br>Innbúgv: 1.573.064<br>Mvg: 98.316,50<br>Óvæntað: 100.000,-<br>Íalt kr. 1.771.380,50<br><br>Játtan er ikki til hetta í inniverandi fíggjarætlan. Um hetta skal íverksetast í heyst, er tískil neyðugt við eykajáttan til endamálið. |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Sambært kommunu stýrislógini §38 skal fíggjarnevndin ummæla uppskot til eykajáttan, sum skal leggjast fyri býráðið og sambært § 41 krevur eykajáttanin tvær góðkenningar frá kommunustýrinum við í minsta lagi 14 daga millumbilum. |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tilíkt**<br>Kommunustýrislógin og Kommunustýrisskipanin fyri Fuglafjarðar kommunu |

13

| | |
|---|---|
| | • Møgulig fylgiskjøl |
| Viðgerð | |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | nei |
| | Umsitingarligar | Nei | Nei |
| Tilmæli | Mælt verður til at Fíggjarnevndin tekur undir við at veita eina eykajáttan uppá 1.772 tkr. til at gera heilsumiðstøðina lidna og mæla býráðnum til at taka undir við hesum til fyrstu viðgerð mánadagin 19. juni 2023. Eykajáttanin verður fíggjað av innistandandi peningi. | | |
| Dagf | 14. juni 2023 | | |

**Fíggjarnevndin 16. juni 2023:**
Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum um, at heilsumiðstøðin í 2023 fær eina eykajáttan uppá 1.772 tkr. og mælir býráðnum til, at samtykkja eykajáttanina við 1. viðgerð.

14

**Býráðið 19. juni 2023:**
Býráðið tók einmælt undir við uppskotinum og ynskir at fáa betri útgreining av málinum til aðru viðgerð.

Fundurin lokin kl. 20.15

Dávur Juul

Eyðun á Lakjuni

David Andreasen

Edva Jacobsen

Eivin Breiðaskarð

Gudny Vang

Magni Jøkladal

Ólavur Larsen

Bergtóra Cederiusdóttir